# Sund tevjar oljuvinnu



*Sea Star við bryggju á Sundı. mynd kalmar*



*Nýggir vinklar, nýggir vinnumøguleikar. Mynd kalmar*

Fyri tey mongu, sum koyra framvið Sundsbygd og stóru og óbrúktu havnalagnum har man tankin um eina komandi oljuvinnu har ikki vera so fjarur. Nú amerikanska seismikkskipið "Sea Star" hevur fingið avloysara og riggar av, hevur felagið valt at lata skipið liggja við bryggjuna á Sundi í eina góða viku.

Tá hugsað verður um, at júst havnin á Sundi ikki verður brúkt og at hon annars varð ætlað til alternativ vinnuendamál, so munnu mong hugsa tankan, at júst Sund kann gerast framtíðar supply-havn. Her er stórt havnaøki, nakað, sum hevur stóran týdning fyri eina oljuvinnu, og her eru góða havnaviðurskifti, umframt at skjótt er at koma til og frá økinum. Og fyri ikki at gloyma: tað liggur bert fáa kilometrar frá Havnini.

Og hvør veit, um ikki onkur longu gongur við eini ætlan í tonkunum um nettup at brúka havnalagið á Sundi sum framtíðar oljubasa!

jan



## Verkamannafylkingin stillar upp

Verkamannafylkingin hevur avgjørt at stilla upp til Fólkatingsvalið 21. september 1994.

Løgtingsvalið í summar vísti, at veljararnir eisini vilja hava ein flokk, sum ikki er hefturat teimum gomlu.

Verkamannafylkingin stillar upp, tí vit hava ásannað, at ongin av verandi flokkum, er sinnaður at gera nakað fyri at bøta um korini hjá teimum arbeiðsleysu, hjá verkamanninum, fiskimanninum og hjá partinum av Føroya fólki, sum líðir undir rikna politikkinum.

Verkamannafylkingin fer ikki upp niðurbrótingararbeiðið av vælferðarsamfelagnum. Tvørturímóti halda vit okkum til vælferðarhugsjónina og vilja varðveita og menna vælferðarsamfelagið.

Til hetta arbeiðið er brúk fyri Verkamannafylkingini.

Verkamannafylkingin ætlar at brúka fólkatingssessin, sum ein part av samlaða politiska arbiðinum. Okkara umboð í Fólkatinginum skal tora at greiða frá veruligu støðuni í Føroyum. Vit skulu ikki fjala veruleikan.

Okkara umboð fer ikki til Danmarkar á biddaraferð, men við einum greiðum kravi um, at avtalur millum danska statin og Føroyar verða gjørdar á jøvnum føti.

Á løgtingsvalinum vísti Føroya fólk við atkvøðuseðlinum, at brúk er fyri umfatandi uppruddíng.

Verkamannafylkingin bjóðar sær til at halda fram við hesi upprudd-ingini.

Á listanum hjá Verkamannafylkingini til Fólkatingsvalið tann 21. september eru hesi trý valevnini klár:

Óli Jacobsen,
løgtingsmaður,
Ingeborg Vinther,
løgtingskvinna og
Øssur Winthereig,
journalistur.

**JA!** Eg gerist haldari av Tíðindablaðnum Sosialinum og fáið blaðið 5 f[illegible]ðir um vikuna.
fyri 225 kr./ársfj. (haldarar í Føroyum)
fyri 425 kr./ársfj. (haldarar í Danmark)
Ymsir prísir fyri onnur lond

Til ber altíð at gerast haldari og goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum.

Navn: ..........
Bústaður: ..........
Bygd/býur: ..........
Land: ..........
Tlf.: ..........

Kannað postverkinum

Ókeypis
Sosialurin
rindar
postgjaldið

64

*Tíðindablaðið*
**SOSIALURIN**
Postboks 76,
FR-110 Tórshavn

**BILLUTIR**
útvegast til
**FLEST ALLAR BILAR**
**Fa. BILLUTIR**
Tlf. 21605 Fax. 21666

BERGMENN

**Vit gera gamla gólvið sum nýtt**
*Gólvtænastan*
Skemmingsgøta 19 Tlf. 18875 - 88875
Tórshavn Fax. 18809
*Ókeypis tilboð og vegleiðing verða givin.*